Original
**bosal**
Útstoyt



**ES**

**p/f Esmar Simonsen**
**Kambsdalur**
**FR-530 Fuglafjør›ur**
**Tlf. 444405**
**Fax444629**

# Starvsfólk til KT-deildina

**KT-deildin**

KT-deildin er ein stápur undir stjóranum, sum hevur til uppgávu at umsita innanhýsis edv-skipanina á Føroya Tele. Menningin og broytingarnar á Føroya Tele hava ført við sær, at virksemið á KT-deildini er munandi økt. Tørvur er tí á einum starvsfólki til uppgávur innan lokalnet og PC'arar.

Í sambandi við at vit ætla at styrkja deildina, skulu vit brúka eitt starvsfólk afturat á KT-deildini. Í KT-deildini starvast 9 fólk, og taka tey sær av øllum innanhýsis edv-kervinum á Føroya Tele.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur kunnleika til eitt ella fleiri av fylgjandi:
- Lokalnet
- Novell
- Groupwise
- Windows NT
- PC'arar
- Netprintarar
- Almennan EDV kunnleika

Umsøkjarin skal eisini hava góðar menniskjaligar eginleikar, duga at samskifta og at arbeiða í bólki.

Arbeiðið verður alt fyrifallandi edv-arbeiði í sambandi við okkara lokala /PC'netverk.
Vit vænta, at umsøkjarin hevur viðkomandi KT-útbúgving ella royndir á líknandi stigi.
Nýútbúgvin eru eisini sera vælkomin at søkja.

Løn sambært sáttmála og kvalifikatiónir.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Michael Thomsen á telf. 303030.

Umsóknir skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 11. februar 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

**Sosialurin**

**Føroya Handilsskúli**

# DATANOMSKEIÐ

Um nóg stórur áhugi er, verður í vár farið undir 2 nýggj datanomskeið, hesaferð í

**Systemmenning II** (lærari Poul Rytter Larsen)
**Dátugrunnar II** (lærari Allan Dresling)

Tey, sum vilja vita meira um skeiðini, kunnu venda sær til skúlan eftir tilfari ella hyggja á heimasíðuna:
**heima.olivant.fo/~jonsen/datanom**

**Próvtøkan verður hálvan mai**.

Roknað verður við, at skeiðluttakararnir hava merkonomútbúgving ella hægri handilsprógv ella drúgvar, fjølbroyttar royndir í arbeiði við teldum.

**Kostnaður kr. 2.150,00**, bókin ikki íroknað.

Áhugað verða biðin um at venda sær til skúlan tel. 31 71 77 skjótast gjørligt og **áðrenn mikudagin 26. januar.**

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Marknagilsvegur 77 • Postsmoga 177 • FO-110 Tórshavn

Sosialurin - 311820

# Missiónsvika

**– bjóða verður til missiónsviku í Meinigheitshúsinum í Havn**

***í døgunum 23. januar til 30. januar 2000***

## Skráin verður hendan

**Sunnukvøld 23. januar kl. 18.00**
Talari Heri Joensen, prestur, Havn
Manskórið í Sandoy luttekur

**Mánakvøld 24. januar kl. 20.00**
Talari Sørin Steinhólm, prestur, Havn
Kristiliga Sangkórið luttekur

**Týskvøld 25. januar kl. 20.00**
Talari Sverri Kass, Strendur
Argjakórið luttekur

**Mikukvøld 26. januar kl. 20.00**
Talari Pól Jóhannesen, Hvannasund
Meinigheitskórið í Havn luttekur

**Hóskvøld 27. januar kl. 20.00**
***Ungdómurin skipar fyri kvøldinum***
Talari Bárður Kass Nielsen, Nes
Gittit luttekur

**Fríggjakvøld 28. januar kl. 20.00**
Talari Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari, Nes
Petur Hans Hansen og Thomas Dam luttaka

**Leygarkvøld 29. januar kl. 20.00**
Talari Regin Høgnesen, trúboðari, Leirvík
Manskórið í Meinigheitshúsinum luttekur

**Sunnudag 30. januar**
**kl. 14.00 Familjumøti**
**kl. 18.00 Møti**
Talari Regin Høgnesen, trúboðari, Leirvík
Streingjakórið í KFUM og K í Klaksvík luttekur
**kl. 21.00 Eftirmøti**
**Gittit luttekur**

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

# Søkt verður eftir fólki

Til arbeiðspláss okkara í Havn – á Eystaru Bryggju og á Glyvursnesi – sóknast vit eftir:

**mekanikara**
**spreingimeistara**
**royndum maskinførarum**

Áhugaði biðjast venda sær til skrivstovu okkara uttast á Eystaru Bryggju – yrkadagar millum kl. 14 og 16 – har nærri fæst at vita frá Lis Johansen.

**P/F E. Pihl & Søn Føroyar**
Tlf. 31 76 46 • fax 31 46 86

# FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT



**SAFARI TRANSPORT**

**GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR**

**Tlf. 32 22 22**

**bobcat** *-maskinurnar sum halda!*

- **Gravmaskinur** ***–nógv model***
- **Lessarar við óteljandi møguleikum!**

**Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.**

***Keyp góðsku – keyp Bob Cat!***



Sosialurin - 311820

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008



**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

# Fyribilsskattaskráin 2000 Fríir ágóðar v.m.

Hjá teimum, sum hava ymisk framíhjárættindi sum part av lønini, ásetur Toll- og Skattaráð Føroya eina ferð um árið virðið á hesum lunnindum, og eru virðini fyri 2000 hesi, íroknað meirvirðisgjald:

| | | |
|---|---|---|
| a) Virðið á fríum bústaði: | | |
| íbúð (partur av húsum) pr. m² | kr. | 424 |
| íbúð (heil hús) pr. m² | kr. | 334 |
| b) Eginnýtsla av el | kr. | 6.200 |
| c) Eginnýtsla av olju | kr. | 9.700 |
| d) Frí telefon | kr. | 4.200 |
| e) Virðið á fríum kosti pr. dag: | | |
| 3 máltíðir | kr. | 78 |
| 2 máltíðir | kr. | 59 |
| 1 máltíð | kr. | 43 |
| f) Virðið á fríum bili: | | |
| 1100 kg og undir | kr. | 41.700 |
| 1101 kg til 1300 kg | kr. | 53.300 |
| 1301 kg og meira | kr. | 66.500 |

Allir aðrir bilar, sí viðmerking niðanfyri,
kr. 31.200/ 20.800

**Eginnýtsla hjá privatum vinnurekandi**
Privatur vinnurekandi skal skatta av virðinum á vørum og framleiðslum, sum hann tekur úr virki sínum at nýta ella at hava í húsarhaldi sínum ella til gávur. Virðið verður roknað eftir keypsvirðinum ella framleiðsluvirðinum á hesum vørum.

Somuleiðis skal privatur vinnurekandi skatta av tí partinum av útreiðslunum, sum svarar til privatnýtsluna, tá tað snýr seg um t.d. bil, telefon, ljós og hita, har útreiðslurnar umfata bæði privatu og vinnuligu nýtsluna.

Meginreglan er tann, at skattgjaldarin sjálvur skal gera eina neyva metan av, hvussu nógv er privat, og hvussu nógv er vinnulig nýtsla, og skal henda metan vera við atliti til støðd á t.d. húsi og húski.

Sum leiðbeinandi minstamark hevur Toll- og Skattaráð Føroya tí ásett hesi virði fyri nýttar vørur:

| | | |
|---|---|---|
| g) Eginnýtsla av vørum: | | |
| Bakarar | kr. | 6.000 |
| Bakarar við keypmansvørum | kr. | 7.900 |
| Keypmenn | kr. | 21.300 |

Leiðbeinandi minstamark fyri privatnýtslu av bili hjá hýruvognsførara er kr. 14.800.

h) Virðið á partaeigaralánum hjá høvuðspartaeigarum: 9%
i) Kapitaleftirlønarfrádrátturin er hægst kr. 40.100
j) Frádráttur hjá donskum lesandi kr. 58.000

**Viðmerking til „Allir aðrir bilar" undir f)**
Omanfyri nevndu upphæddir eru galdandi fyri bilar skrásettir sum persónvognar smb. § 3 í ll. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum.

Fyri bilar skrásettir sum vørubilar eftir § 5 í ll. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum verður virðið sett til 75% av upphæddini fyri bilar undir 1100 kg.

Fyri aðrar bilar enn omanfyri nevndu t.d. bilar skrásettir eftir § 6 og § 8 í ll. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum verður virðið sett til 50% av upphæddini fyri bilar undir 1100 kg.

Toll- og Skattstova Føroya tilskilar sær rætt at krevja avrit av skrásetingarskjalinum fyri bilin.

Tórshavn, 17. januar 2000

**Toll- og Skattaráð Føroya**

# Skeið í eiturvistfrøði (økotoksikologi) og dálking

Fyrsta februar byrjar skeið í eiturvistfrøði og dálking á Fróðskaparsetrinum.

Skeiðið er á 6. lestrarhálvu í Bs útbúgvingini í lívfrøði á Náttúruvísindadeildini. Fólk við hóskandi førleikatreytum, ið ikki eru knýtt at Fróðskaparsetrinum, kunnu eisini fylgja skeiðnum.

Marian Dam frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni undirvísir í grundleggjandi hugtøkum innan eiturvistfrøði og dálking, m.a. tungmetallum, østrogenum, DDT, PCB og dioxinum. Arne Nørrevang frá Náttúruvísindadeildini undirvísir í oljudálking og eutrofiering og Hans Pauli Joensen, eisini frá Náttúruvísindadeildini, undirvísir í radioaktiviteti. Undirvísingin endar 25. februar, tá landsstýrismaðurin í umhvørvismálum, Eyðun Eltør, fer at greiða frá føroyskum umhvørvispolitikki.

Undirvíst verður hvønn dag frá kl. 10.15-12.00

Skrivlig próvtøka verður 3. mars 2000

Tey, ið ynskja at vita meira um skeiðið, kunnu hyggja á heimasíðuna hjá Náttúruvísindadeildini:
www.sleipnir.fo/setur/nvd/undirpla.htm. Her er ein undirvísingarætlan, har tú sært, hvørji evni verða gjøgnumgingin teir einstøku dagarnar, og hvar í lærubókini evnið er umrøtt.

Tey, ið kundu hugsað sær at fylgt skeiðnum, kunnu venda sær til Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum tel. 31 53 06.

**Náttúruvísindadeildin**

# Náttarvaktir søkjast

Hervið verður søkt eftir náttarvaktum til SMS.

Arbeiðstíðin er frá kl. 23.00-08.00.
Leygar- og sunnumorgnar tó til kl. 10.00.

Arbeitt verður í 1 viku og frí í 1 viku.

Umsóknir kunnu sendast til:

**SMS**

Postboks 1059 • 110 Tórshavn
Att.: Hans Mortensen

Tel. 31 30 41

Sosialurin - 311820

*Halt* **sosialin**

# Dagligur leiðari

Søkt verður eftir dagligum leiðara til Kaggan. Arbeiðið umfatar starvsfólk, innkeyp og lagur umframt tað dagliga arbeiði.

Fyrimunir eru um viðkomandi dugir at arbeiða sjálvstøðugt og við teldu.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 1. febr. 2000 og skulu sendast til

Kaggan
Dalavegur 1
100 Tórshavn

og merkjast »dagligur leiðari«. Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri fæst at vita um starvið á tlf. 21 41 70.

**Nevndin**

# Tímalærari til Fiskivinnuskúlan

Søkt verður eftir tímalærara í **informatións-viðgerð (B-stig)** at byrja á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna 14. februar 2000. Undirvísingartímatalið er 4 tímar um vikuna.

Umsøkjarar skulu hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinini.

Tímarnir verða løntir samsvarandi tímalærarum á studentaskúla- og HF-skeiðunum.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella á Undirvísingar- og mentamálastýrinum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av próvskjølum v.m. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 4. februar 2000.



**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73
Teldupostur:
fiskvest@fiskvest.fo

# Hús til sølu

Um nóg høgt boð fæst, verða sethúsini á Hetlandsvegi 6, Tórshavn lýst til sølu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

Sosialurin - 311820